ítróttur

Nr. 41 • leygardagur • 28. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Rumbul innan føroyska svimjing

Herfyri segði einasti altjóða dómarin í føroyskari svimjing seg frá sum dómara og undirvísara hjá Svimjisamband Føroya. Orsøkin er eitt skriv frá feløgum og einstaklingum kring landið, sum tó í flestu førum ikki vilja kennast við skrivið

SVIMJING
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo



Ein av stoltleikunum hjá Svimjisambandi Føroya seinastu árini hevur verið, at tey hava kunnað latið høvuðsdómara til kappingarnar á oyggjaleikunum. Hetta er tíverri fortíð, tí herfyri segði einasti altjóða dómarin hjá føroyingum, Sørin Djurhuus, seg frá sum dómara og undirvísara hjá Svimjisambandinum. Orsøkin er eitt skriv, ið Sosialurin hevur fingið fatur á, har funnist verður hvassliga at dømingini til kappingar kring landið.

Feløg vilja ikki kennast við brævið

Í brævinum stendur m.a. *»Undirritaðu hava seinastu árini, sæð eina røð av sera óheppnum avgerðum, ið hava verið tiknar av dómarum og høvuðsdómarum, hetta serliga hvat viðvíkur kolldømingum«*

Tað marghåttliga er tó tað, at fleiri av teimum, ið standa sum avsendarar av brævinum, als ikki vilja kennast við tað. Millum annað standa fýra svimjifeløg, Tvøroyrar Svimjifelag, Vágs Svimjifelag, Havnar Svimjifelag og Svimjifelagið Ægir í Klaksvík, sum avsendarar, men bæði Ægir og Tvøroyrar Svimjifelag hava greitt meldað út, at tey hava einki við skrivið at gera. Somuleiðis hava Fuglafjarðar Svimjifelag, Svimjifelagið Skeggjar og Flot eisini sagt seg ikki at taka undir við skrivinum.

Somuleiðis verður í brævinum sagt, at kolldømingin ofta rakar teir »góðu« svimjararnar, og at tað drepur hugin hjá børnunum. Í brævinum verður sagt, at hetta gevast við at svimja, og at SSF má hava í huga, tí sum tað stendur *»Tað er sera umráðandi, at hugsað verður um alt tað arbeiði og alla tað tíð sum børn, feløg, venjarar og ikki minnst foreldur leggja í svimjingina. Fyri hvørt barnið tit missa til annan ítrótt, missa tit somuleiðis ikki minni enn 1- 2 ágrýtin foreldur, til at taka eina hond í við tykkum svimjingini at frama«* So tað tykist sum um foreldrini eru eins umráðandi sum børnini, ið svimja.

Formaðurin harmast um støðuna

Katrin Joensen er formaður í Svimjisambandi Føroya, og hon harmast sjálvsagt um støðuna. Hon sigur, at í Føroyum hevur tað altíð verið dømt eftir galdandi reglum, og at SSF heldur, at tað er rættast at halda seg til altjóða reglar. Formaðurin í SSF harmast ikki minst um, at fleiri svimjifeløg kring landið standa sum avsendarar av brævinum, hóast tey einki hava við brævið at gera. Katrin Joensen sigur, at eftir hennara tykki sær tað út til, sum um tað eru nøkur foreldur, ið eru farin aftur um ryggin á avvarðandi svimjifelag og hava sent skrivið saman, tí tey eru misnøgd við dømingina.

Formaðurin í SSF sigur, at eftir teirra tykki er tað ein óvani, at svimjarar ikki svimja tekniskt rætt frá byrjan, og einasti møguleikin hjá okkum at fáa tiðir góðkendar á altjóða støði, er tað neyðugt, at svomið verður tekniskt rætt.

Hon ásannar tó, at neyðugt er at endurskoða skipanina av svimjikappingum í landinum, og hetta ervið verður viðgjørt á einum fundi í Vági í vikuskiftinum. Tað er ein trupulleiki, at alt ov nógvir svimjarar, ið ikki eru búnir til kappingar, verða meldaðir til kappingarnar, har dømingin er strang. Best hevði verið, um tað var eitt slag av frásortering innan kappingarnar, sigur Katrin Joensen.

Síðani kundi verið skipað fyri sonevndum stuttleikakappingum fyri hesum børnum, har ikki var dømt eftir galdandi reglum, men hetta er nakað, ið vit noyðast at taka upp við feløgini, sigur Katrin Joensen formaður í Svimjisambandi Føroya. Hon leggur afturat, at SSF hevur kalendarafund í maj, har mann evt. kann leggja slíkar kappingar inn í kappingarárið hjá føroysku svimjarunum.

Vil ikki kennast við skrivið

Ein av teimum einstaklingum, ið stendur sum avsendari av skrivinum, er venjarin hjá Skeggjum, Søren Olsen, ið eisini er fyrrverandi landsliðssvimjari. Sørin sigur, at hann ikki hevur verið við til at orða skrivið, og hann tekur fjarstøðu frá tí. Hann heldur, at viðkomandi, ið hevur orðað skrivið, hevur gjørt tað út frá egnum tankum.

Tó sigur Søren Olsen, at hann er fyri at linka krøvini, og hann heldur bestu loysnina verða, at føroyingar fara at gera eins og danir, ið hava eitt sokallað "innlæringartíðarskeið" hjá svimjarum upp til 12 ára aldur. Hann sigur, at í Danmark hava tey ikki smáunglingameistaraskap, og tískil er rúm tíð, har svimjarar kunnu læra seg tað tekniska í svimjingini, áðrenn tey fara at taka lut í størri kappingum.

Eisini heldur venjarin hjá Skeggjum, at tað er umráðandi hjá fólki at minnast til, at tað eru venjararnir í teimum einstøku feløgunum, ið avgerða hvørjir svimjarar taka lut í kappingum. Venjarin skal meta um, nær svimjarin er klárur til kappingar, og tað skulu foreldur og SSF ikki blanda seg uppí, sigur Søren Olsen.

Søren Olsen heldur tað verða stórt spell, at altjóða dómarin hjá føroyingum, Sørin Djurhuus, nú hevur takkað fyri seg, tí hann hevur offrað 30 ár av sínum lívi til svimjingina, og tøkkin hann fær, er eitt hvassorðað skriv, har nøkur foreldur og okkurt einstakt svimjifelag vísa sína óngøð við kolldømingina av sínum børnum, sigur venjarin hjá Skeggjum.



Avbjóðarin hjá Kyndli skal finnast

Kyndil heldur heilt víst fast um oddasessin, men á Skála skulu StÍF og Neistin gera av, hvør teirra skal vera liðið, sum leggur seg í bakhjólið undan endaspurtinum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Soleiðis sum úrslitini lagaðu seg seinasta vikuskifti, so styrkti Kyndil um sína oddastøðu í bestu mansdeildini.

Hetta hava teir sjálvandi eisini møguleika til um vikuskiftið, og fyrsta treytin í fyri hesum er sjálvandi, at teir grønu vinna heimadystin móti H71. Á pappírinum ein yvirkomulig uppgáva, tá H71 er niðasta liðið í deildini, men hinvegin eru júst hoyvíkingar teir, sum hava givið Kyndli størstu trupulleikarnar í ár, og bæði í grundspælinum og í steypakappingini megnaði H71 at koppa oddaliðnum.

Tí er einki at ivast í, at áskoðararnir kunnu rokna við einum lívligum dysti. Einum dysti, har leikararnir í øllum førum fara at offra seg fult og heilt fyri sakini, og so er spurningurin helst bara, hvør parturin megnar at halda høvdinum nóg køldum í avgerandi løtunum.

Avbjóðarin skal finnast

Og hjá Kyndils-áskoðarunum verður spenningurin helst tvífaldur sunnudagin. Eitt er, hvussu tað gongst uppi á Hálsi, men spenningurin er helst líka stórur um útfallið inni á Skála, har StÍF skal taka ímóti Neistanum.

Her er Neistin undan dystinum nummar tvey við 12 stigum mótvegis teimum 11 hjá StÍF á triðja plássi, men alt annað enn ein Neista-sigur vil hava við sær, at munurin hjá Kyndli niðureftir kann økjast við einum sigri, og hendir tað, so fer av álvara at síggja ljóst út hjá Kyndli.

Hjá Neistanum var stórur saknur í stórskjúttunum báðum seinasta vikuskifti, og sum støðan var hóskvøldið, so skulu tey í Neistanum ikki gera sær tær heilt stóru vónirnar um nógv mál frá ávíkavist Heina Hanusarson og Dragisa Stojovic. Dragisa er tó so spakuliga farin undir venjingarnar aftur, og hann verður helst í hópinum sunnudagin, men tað tykist tí í skrivandi løtu ógvuliga ivasamt, hvussu týðandi leiklut hann kann átaka sær sunnudagin.

Hjá StÍF hava skaðar eisini gjørt sítt til at órógva kappingarárið. Serliga hevur saknurin verið stórur í Sveini Justinussen og Marian Cirloganescu, men nú eru teir báðir so smátt við at koma fyri seg. Sveinur hevur vant við alla hesa vikuna, og á Skála verður roknað við, at hann verður við í hópinum sunnudagin. So er spurningurin, hvussu

Eftir skaðasteðg síðani landsdystirnar fyrst í januar mánaði, tykist Sveinur Justinussen nú vera komin somikið fyri seg, at hann aftur fer at tørna út fyri StÍF

strandingar gera rúm fyri honum, nú stóri-beiggin, Leivur, hevði eitt so gott hál seinast, men onkursvegna man tó fara at bera til at troka Svein inn í hópin.

Hjá Marian stendur ikki heilt so væl til. Eisini hann er so smátt farin undir aftur venjingarnar, men enn tykist tað vera soleiðis, at vegleiðandi rópini frá honum skulu koma av beinkinum og ikki inni úr málteiginum.

Og tað kundi væl hent seg, at rópini gerast nógv sunnudagin. Eitt er so víst. Hvørki StÍF ella Neistin hava ráð til at missa nakað sum helst nú. Tey kunnu ikki dúva uppá, at Kyndil áhaldandi skal mistaka seg móti Hoyvíkingunum, og sum er munnu bæði tvey helst halda, at ávíkavist trý og fýra stig upp til oddasessin er ríkiliga stórur munur at skula vinna aftur.

Hvar er VÍF?

Seinasti dysturin um vikuskiftið verður í Vestmanna, har KÍF vitjar á gamla heimavøllinum.

Her er einki at ivast í, at VÍF eftir sigurin á Neistanum fer eftir enn einum sigri, soleiðis sum teir hava møguleika at gera seg galdandi á heiðursmerkjaplássunum. Spurningurin er so, hvørt teir við sigrinum á Neistanum hava fingið vent tungu gongdini, ella um hetta bara var eitt úrslit av teimum skerjingum, sum Neistaliðnum nú er fyri. Frá kollfirðingum fáa teir vanliga ikki nakað sum helst forerandi, og KÍF hevanir um at klintra eitt sindur upp eftir stigatalvuni.

Finaluumførini

Seinastu tvey umførini í donsku 1. deild verða leikt um vikuskiftið. Føroyingar - sum í løtuni eru á 6. plássi - ætla sær eftir 3. plássinum.

UPPTAKT
Talvfelagið Føroyar

Málið er rokkið; Føroyska talvfelagið flytur ikki niður. Heili sjey stig eru niður til niðurflytingina, men hinvegin eru einans hálvttriðja stig upp til 3. pláss.

Støðan undan seinastu umførini:

Helsinge	30,0
Skolerne	26,0
SK 1968	21,5
K41	21,5
Brønshøj	19,5
TF Føroyar	19,0
Nørresundby	12,0
Århus	10,5

Føroyingar hitta toppliðið Skolerne í sætta umfari leygardagin og botnliðið Århus sunnudagin. Allir dystirnir í finaluumførunum í 1. deild verða leiktir undir sama taki í Århus.

Fyrri dysturin verður móti einasta kappingarneytunum hjá Helsinge, Skolerne. Teir hava sjey altjóða meistarar (IM) á liðnum, og á flestu borðunum eru allir javnt sterkir. Stjørnan á liðnum er 18 ára gamli Davor Palo, sum verður mettur at vera størsta talent í Danmark í longri tíð. Væntandi megnar norski stórmeistarin á føroyska liðnum við hvíta fólkinum at steðga unglingunum.

Føroyska liðið hevur styrkt um borðini, nú John Rødgaard er fingin niður í royndunum um at vinna seg fram á heiðursmerkjapláss

Samanumtikið kann nevnast at vit eru mettur at fáa eitt petti omanfyri 3 stig á teimum átta borðunum. Málið er at fáa ein 4-4 javnleik. Tað er ikki óreialistiskt, og samstundis er tað eitt slag av einum kravi, um føroyingarnir vilja røkka einum møguligum 3. plássi.

Stórsigur á botnliði

Fær liðið eitt gott úrslit móti Skolerne leygardagin, verður lagt harðliga til brots móti botnliðnum Århus sunnudagin. Málið er ein størsigur áljóðandi umleið 6-2.

Hetta ljóðar helst sum um føroyingarnir undirmeta liðið úr Århus. Århusliðið, sum hevur mist nógvir góðir telvarar til onnur lið, hevur sum heild telvað á einum sera lágum støði í ár. Eisini eru teir helst vissaðir at flyta niður, tá teir hitta føroyska felagið sunnudagin, og hava tí ikki neyðuga sjálvsálitið undan dystinum sunnudagin. Um allir á føroyska liðnum megna at halda nervarnar í ró og konsentratiónina í hásæti, átti tað verið ein møguleiki fyri stórsigri.

Styrkur úr Føroyum

John Rødgaard verður við føroyska liðnum báðir dystirnar. Við sínum royndum verður hann liðnum ein kærkomin hjálp í vónini um at røkka einum sensationellum triðja plássi í fremstu donsku deildini. Hóast triðja plássið ikki er veruleikafjart, er eitt 4-6. pláss ivaleyst nøktandi.

Vert at leggja til merkis er, at føroyingar bert hava tapt ein dyst higartil í donsku elitudeildini, nevnliga lemjandi 1-7 ósigurin móti toppliðnum Helsinge. Annars hevur felagið vunnið tveir dystir og leikt tveir javnir.

Væntaðu liðuppstillingarnar í 6-7. umfari:

6. umfar

Føroyar		Skolerne		Væntað skora
1 GM Einar Gausel	2525	IM Davor Palo	2510	0,52
2 IM Nikolaj Borge	2408	IM Karsten Rasmussen	2454	0,44
3 John Arni Nilssen	2426	IM Henrik El-Kher	2404	0,53
4 Flóvin Tór Næs	2337	IM Jan Sørensen	2402	0,41
5 IM John Rødgaard	2306	IM Mads Boe	2366	0,42
6 Heini Olsen	2264	IM Uffe Vinther-Schou	2397	0,32
7 Carl Eli N. Samuelsen	2194	IM Tobias B. Christensen	2381	0,26
8 Heini Danielsen	2165	Thomas Ochsner	2352	0,26
				3,16

7. umfar

Føroyar		Århus		Væntað skora
1 Einar Gausel	2525	Rasmus Skytte	2403	0,67
2 Nikolaj Borge	2408	Daniel Vesterbæk Pedersen	2366	0,56
3 John Arni Nilssen	2426	John Rendboe	2210	0,78
4 Flóvin Tór Næs	2337	Jakob Bjerre Jensen	2205	0,68
5 John Rødgaard	2306	Jan Rode Pedersen	2189	0,66
6 Heini Olsen	2264	Peter Husted	2179	0,62
7 Eyðun Nolsøe	2227	Martin Skov Jakobsen	2168	0,58
8 Carl Eli N. Samuelsen	2194	Vagn Jensen	2152	0,56
				5,11